## Leirvík tendrar jólatræ

Jólatræðið í Leirvík verður tendrað týsdagin 2. desember klokkan 19.30. Røðuna heldur Bárður á Lakjuni, meðan Eystanljóð fer at syngja. Í sambandi við at Leirvíkar kommuna fer í søguna, fer Frígerð Heinesen, borgarstjóri, at siga nøkur orð. Aftan á eru øll boðin til kaffi, té, saft og eplaskivur í fimleikarhøllini. Tað eru Leirvíkar kommuna og Skótalið Leirvíks Páll, ið skipa fyri haldinum.



# Føroyingar í terrormeldri í Mumbai

**Mikael Gren starvast í løtuni í terrorrakta Mumbai, har hann býr saman við konuni, Leilu á Lofti, og børnunum. Vit merktu ágangin eins og var tað indiska 11-09, sigur Leila á Lofti við Rás2**

TERRORÁGANGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Leila á Lofti avmyndað á Leopold matstovuni, sum eisini fekk skaða undir terrorálopinum í gjárkvøldið*

*Mynd: privatmynd*

- Hetta virkar púra óveruligt. Vit skilja ikki, at vit eru mitt í øllum ræðuleikanum, men vit hava tað gott.

Soleiðis segði Leila á Lofti, tá Rás2 fekk orðið á hana beinleiðis úr Mumbai í India.

Hon sigur, at indiskir tíðindamenn sammeta hesa terror atsóknina við tað, sum hendi í New York 11. september 2001, tá tey bæði tvíburatornini, World Trade Center, vórðu álopin við kapraðu flogførum og stutt eftir fullu í grús.

- Hetta hendi seint í gjárkvøldið, um 22-tíðina. Mikael var farin at leggja dóttrina, og eg setti meg at hyggja í sjónvarp. Tá sá eg, at okkurt var hent við Leopold matstovuni, har vit onkuntíð hava etið. Eg fór at vekja Mikael, sum var sovnaður, og so fylgdu vit bæði við í tí, sum hendi, greiðir Leila á Lofti frá.

Tey funnu so út av, at hendingarnar fóru fram í Suðurmumbai.

- Vit búgva í Norðurmumbai, so tað var sum so ikki tætt upp at okkum, men kortini vórðu vit ávarað ímóti at fara út. Eisini fingu vit at vita, at amerikanski skúlin, har børn okkara ganga í skúla, varð stongdur, sigur Leila á Lofti.

Samstundis sóu og merktu tey eisini, hvussu spreingingarnar komu nærri og nærri norður eftur móti býarpartinum, har føroyska húskið býr.

### Í hjartanum av býnum

Leila á Lofti sigur, at býurin mest sum er settur í undantaksstøðu.

Tað er heilt undarligt at uppliva ein milliónabý, har ferðslan annars flýtur døgnið runt, vera so friðarligan sum í dag. Umframt fleiri skúlar, so eru eisini fleiri arbeiðspláss stongd í dag, millum annað skrivstovubygningurin, har Mikael arbeiðir, sigur Leila á Lofti.

Føroyingar finnast allastaðni, verður sagt, men Leila á Lofti dugir kortini ikki at siga, um aðrir føroyingar eru í Mumbai í hesum døgum.

Hon greiðir annars frá, at nógv verður tosað í sjónvarpinum um, hvussu hesir terroristarnir eru komnir inn í býin.

- Roknað verður við, at teir eru komnir sjóvegis úr Pakistan og hava siglt mitt inn í Suðurmumbai, har teir so eru farnir í land. Tað svarar til, at teir høvdu siglt inn í Vágsbotn og komið á land har, sigur Leila á Lofti.

Teir tóku so hotell eftir hotell, og sambært tíðindunum noyddu teir hotellgestir at vísa passini, og tey, sum høvdu bretsk ella amerikansk pass, vórðu hildin aftur sum gíslar.

### Tamarhald

Serdeildir hjá herinum komu skjótt til býin, og fingu fríað hersettu hotellini, teirra millum Taj Mahal hotellið nærhendir Gateway to India. Sambært Lailu á Lofti er nú bert hin eini bygningurin eftir, sum terroristarnir framvegis hava hertikið, ein ísraelskur bygningur við bæði íbúðum og templi.

- Men herdeildirnar mugu fara varisliga til verka, tí talan kann verða um fellir, sum eru lagdar fyri tær. Teir mugu søkja rúm úr rúmi, og leita við hundum, tí bumbur kunnu vera festar til tey líkini, ið herdeildirnar koma fram á, sigur Leila á Lofti.

Hon sigur víðari, at illgruni er um, at terrosistarnir eru komnir úr Pakistan, og at tað kanna hava samband við, at pakistanski uttanríkismálaráðharrin júst í hesum døgum er í India á vitjan fyri at royna at skapa linna millum londini bæði.

- Pakistanski uttanríkismálaráðharrin hevur í indiskum sjónvarpi úttala seg ógvuliga harðliga móti hesum terrorálopinum og hevur hvassliga fordømt atsóknina, sigur Leila á Lofti við Rás2.

# Eitt hevndarálop

**Bólkurin »Deccan Mujaheddin«, sum hevur tikið ábyrgdina fyri álopinum í Mumbai, er eftir øllum at døma ein suðurindiskur partur av islamska bólkinum »Indiski Mujaheddin«. Teirra ynski er at hevna álop ímóti muslimum í Mumbai**

BAKGRUND
*Snorri Brend*

Stig Toft Madsen, sum er Indien-serfrøðingur við Center for Øst- og Sydøstasienstudier við Lunds Universitet sigur við heimasíðuna hjá Danmarks Radio, at hesin bólkurin ynskir at betra um viðurskiftini hjá teimum 150 mió av muslimum í Indien.

- Men teir vilja fegin fáa hevnd fyri tað órættvísið, sum er víst ímóti teimum indisku muslimunum. Í Bombay (sum nú eitur Mumbai) vórðu muslimar álopnir av hindu'um í 1992, uttan at málið fekk eina uppgerð í rættarhølunum, sigur hann.

Deccan Mujaheddin er ein higartil ókendur bólkur, men orðið Deccan vísir til eina hálvoyggj har suðuri í landinum. Bólkurin er tí, eftir øllum at døma ein undirbólkur hjá Indisku Mujaheddin, sum hevur tikið ábyrgdina fyri fleiri terrorhandlingum í India.

Mett verður, at hetta sera væl skipaða álopið í gjárkvøldið er komið óvart á indisku myndugleikarnar.

- Hetta seinasta árið hava fleiri álop verið ímóti Indian Mujaheddin og faðirfelagsskapinum SIMI (Students Islamic Movement of India). Tað ger tí fólk bilsin, at teir eru førir fyri at skipa fyri eini so stórari aktión. Teir indisku myndugleikarnir trúðu í roynd og veru, at teir høvdu forkomið hesum bólkunum, sigur Stig Toft Madsen.

Áður hava hinduistiskir terrorbólkar svara aftur uppá muslimsk álop, men danski serfrøðingurin væntar ikki, at álopið verður afturlønt hesaferð, tí tað er serliga vent ímóti útlendingum í Indien.



- Síðani í 2002 hava verið nógv bumbuálop, har hindu'ar ikki hava lønt teimum aftur. Men ein møguleiki er sjálvandi, at tað eru rabiatir hinduar í Mumbai sum gera tað, sigur hann.